## Seldu til uppboðssøluna

Í gjár tók uppboðssølan í Sørvági ímóti fiski úr Sandoynni. Bátarnir sum avreiddu annaðhvørt á Sandi ella í Skopun vóru hesir: Albatross hevði 638 pund, Ørnin 830 pund, Bárðarenni (myndin) 1488 pund, Boðaberg 556 pund, Fastiklettur 648 pund, og Fiskaklettur 216 pund. Fiskurin verður síðani koyrdur til Sørvágs, skrivar Sandoyarportalurin.



## 250 kvinnur á ting

Seinasta fríggjadag og leygardag var kvinnuting hildið í leguhúsinum í Nesvík. Um 250 kvinnur luttóku, og vóru tær í aldrinum frá 19 til 84 ár. Á skránni var m.a. fyrilestrar og hugnaløtur. Hetta er aðru ferð at eitt slíkt Kvinnuting verður hildið í Nesvík. Eitt líknandi varð hildið í fjør, og eydnaðist tað so mikið væl, at tað varð endurtikið í ár.

## Ein pestilensur

Enn verður nógv tosað, men tosið er, fyri tey sum búgva á Sandoynni, meiri vent til frustrasjónir, av tí at man ikki sær nakað úrslit.

- Fyri tey, sum ikki búgva á Sandoynni, er Sandoyggin og tað afturvendandi tosið um tunnil, vorðið til ein pestilens, til grát og tannagrísl um henda vælsignaða Sandoyartunnilin, sum vit jú ikki hava ráð til, og um henda veruleikan, sum hesi ólukku fólkini á Sandoynni ikki duga at síggja í eyguni.

- Við at búgva á Sandoynni, má tú ásanna, at tú hevur ikki, og fyribils kemur tú heldur ikki at hava somu møguleikar sum onnur nærri miðøkinum hava, vísir Brandur Sandoy á.

*(Sosialurin, 12. februar 2010)*

## Ágangur ímóti Sandoynni

Ágangurin á okkum sum samfelag á Sandoynni, hevur verið sera stórur. Serliga er tað samband okkara við meginøkið, sum man hevur hug at gera seg inná, bæði tá um fíggjarlógartingingar og sjúkratilbúgving umrøður.

Hetta kemst allarhelst av, at man í tí almenna rúminum ikki hevur nóg stórt innlit og innliving í, hvussu okkara støða er, sum útjaðari í samfelagnum. Vit sum búgva á Sandoynni, hava tí eina stóra uppgávu fyri framman tey komandi árini.

Vit mugu vísa í verki, at vit eru før fyri at standa saman, um at krevja okkara rætt sum samfelagsborgarar.

Somuleiðis mugu vit gera betri vart við, at vit ikki eru nøkur útreiðsla fyri samfelagið, sum tað hevur ljóðað síðstu árini, men at vit hava eitt stórt potentiali innan flestu greinar.

*(Brandur Sandoy, borgarstjóri á Sandi)*

# Meðan bíðað verður eftir Sandoyartunlinum



*- Vit hava roynt at víst politikkarunum á, hvussu stóran týdning Sandoyartunnilin hevur fyri okkum her í oynni. Eg veit ikki, - kanska burdu vit havt lagt enn størri arbeiðið í hetta, sigur Brandur Sandoy, borgarstjóri á Sandi. Í dag veit eingin, um ella nær hesin tunnilin kemur*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**- Tað ringasta er at bíða og bíða í óvissu. Høvdu vit so av øllum illum fingið at vita, at undirsjóvartunnilin kom í 2020 ella í 2025, so var tað betri. Men í dag vita vit púrt einki, og tað er djúpt frustrerandi, sigur Brandur Sandoy, borgarstjóri á Sandi**

TUNNILSSAMBAND

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Sandur:** - Ja, høvdu vit bara fingið eitt árstal at halda okkum til. Tað hevði lætt so ómetaliga nógv um, sigur borgarstjórin.

Bæði fólk og politikkarar á Sandoynni vístu sín stóra áhuga í at fáa ætlanina um Sandoyartunnilin framda.

Tey høvdu bæði sæð og frætt um tað gagn og ta menning, sum hevði verið í Vágum og Norðoyggjum eftir at hesi fingu fast samband við meginøkið. Nú ynsktu sandoyingar at fáa lut í hesum sama.

Men illa gekst at fáa ætlanina framda og samtykta, og í dag veit eingin um, ella nær henda stóra og kostnaðarmikla verkætlanin verður sett í verk.

- Beint nú er holdningurin her suðuri tann, at tunnilin er útskotin í óasetta tíð. Og tað er klárt, at hetta er til miklan ampa fyri okkum sum búgva her suðuri, slær Brandur Sandoy fast.

Á kommunuskrivstovuni á Sandi hava tey eisini merkt til hesa gongdina. Fyri nøkrum árum síðani vóru fleiri sum kannaðu møguleikan at fáa grundøki at byggja á.

**Í dag kemur tað næstan ikki fyri!**

> *Henda røðin var so long, at eg mátti bíða í heilar 9 (níggju!) tímar, áðrenn eg slapp við*

### Óheppin gongd

Tað er neyvan nakar sandoyingur, sum ikki ynskir sær ein undirsjóvartunnil, ella dugir at síggja, hvussu neyðugur ein slíkur er fyri menningina av oynni.

Ein skal ikki hava tosað leingi við fólkið á Sandoynni fyrrenn ein sær og skilir, at fyri tey er hetta eitt álvarsmál - og fyri mong